# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

25. mars fingu Maud og Hanus Poulsen, Hvalba, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4000 gr.

30. mars fingu Sigrid Jógvansdóttir og Poul Eiden Müller, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3300 gr.

10. apríl fingu Eyð Matras og Tummas Joensen, Klaksvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3900 gr.

12. apríl fingu Hanna D. Jacobsen og Suni Andreassen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3700 gr.

13. apríl fingu Heidi Hansen, Tórshavn, og Kartin Mortensen, Hvalvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3750 gr.

13. apríl fingu Sonja og Dánjal Davidsen, Kvívík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3650 gr.

14. apríl fingu Lilian Clementsen og Eli Hentze, Sandi, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3600 gr.

## Andlát

**10. apríl**
Ingibjørg Nielsen, fødd Kruse, Tórshavn, ættað av Eiði, 84 ár.
Nanna Elisabeth Olsen, fødd Højgaard, á Hellu á Toftum, 86 ár.
**11. apríl**
Jørgin Hansen, Glyvrar, 64 ár.
**12. apríl**
Simona Johanna Olsen, Klaksvík, vanliga nevnd Mona, 88 ár.
Julia Motzfeldt, ættað úr Grønlandi, búsitandi í Havn, 71 ár.
**13. apríl**
Astrid Maria Dalsgaard Hellisdal, Havn, 50 ár
**14. apríl**
Meinhardt Poulsen, Hvannasund, 88 ár

## Við deyða

## Vilgerð Astridardóttir

**9. oktober 1939 25. mars 2003**



Týsdagin 25. mars andaðist Vilgerð Astridardóttir, 63 ára gomul. Ikki komu deyðsboðini óvæntað. Vilgerð hevði í longri tíð stríðst við herviliga sjúku.

Eg lærdi Vilgerð at kenna fyri ellivu árum síðani, og líktist mær frá fyrsta degi á hesa á so mangar mátar sermerktu kvinnu.

Fyri meg kom Vilgerð at hava stóran týdning, bæði sum sjúkrasystur og sum privatpersónur. Saknurin er ómetaliga stórur, nú hon er farin.

Takk, góða Vilgerð, fyri tann tú vart, fyri tín máta at vera uppá. Takk fyri hjálpsemi, umsorgan og kærleika. At hava kent teg, góða Vilgerð, var mær ein stór æra.

Má Hann, ið øllum valdar, styrkja tykkum, sum eftir sita við sorgini og sakninum.

Ærað veri minnið um Vilgerð Astridardóttir.

**George Joensen**

## Herborg Olsen
## 70 ár



Skírishósdag, 17 apríl, fyllir Herborg Olsen í Sandavági 70 ár. Herborg er ynskt av 10 systkjum. Foreldrini vóru Óla Jacob og Nicolina uppi á Steig í Sandavági. Herborg, f. Thomasen, er gift við Vilhelm Olsen og eiga tey 8 børn. Sum ung var Herborg í Grønlandi og arbeiddi á sjómannsheiminum í Føroyingahavnini. Familjan hevur búð í Danmark og á Sandoynni í sambandi við trúboðaraarbeiði hjá Vilhelmi. Miðskeiðis í 70-unum búsettust tey í heimbygdini hjá Herborg, Sandavági. Herborg hevur tað best, tá hon hevur nógv av sínum egnu hjá sær. Serliga er Herborg góð við síni 14 ommubørn. Herborg er altíð klár at geva eina hjálpandi hond tá ið á stendur.

## Valdemar Lützen
## 70 ár

Langa fríggjadag, 18 apríl, fyllir Valdemar Lützen í Havn sjeyti. Valdemar gekk í skúla og tók millumskúlaprógv í Havn. Longu sum 16 ára gamal fór hann í 1949 til Danmarkar í Handilslæru. Leiðin gekk til Holbæk, har hann stóð í læru hjá handilsfyritøkuni "Bjørns Efterfølger" Eftir lokna skúlatíð fór hann til Newcastle í Onglandi, har hann arbeiddi sum skrivstovumaður í eitt tíðarskeið. Í 1953 flutti hann so til Føroyar at føra familjufyritøkuna Valdemar Lützen víðari. Hetta gjørdi hann m..a við at opna handilin niðri í Vágsbotni. Tað er ikki ov nógv sagt, at Valdemar er ein býarmynd í Havnini. Við sínum lætta lindi, har altíð er tíð til eitt prát ella eina skemtisøgu. Hann hevur 50 ára starvsdag í Vágsbotni 1. august í ár. Tað er ikki bert í Vágsbotni at hann hevur lagt eitt megnaravrik eftir seg. Fyritøkan hevur eisini avgreiðslu og skrivstovu úti í Rættará, har hann eisini hevur virkað hesi 50 árini. Valdemar hevur havt fleiri nevndarstørv, eitt nú á Føroya Handilsskúla og í Prísráðnum. Hann hevur virkað sum franskur konsul síðan fyrst í 1970-unum, og



leggur hann hetta starv frá sær, nú hann fyllir sjeyti. Í Havnini rann saman millum Nannu Heinesen og Valdemar. Tey giftust 18. juli 1959, og eiga tey fimm børn. Nanna og Valdemar eiga sjey ommu- og abbabørn. Føðingardagin er Valdemar burturstaddur.

## Petur Hentze
## 60 ár

Langa fríggjadag. 18. apríl fyllir Petur Z. Hentze 60 ár. Petur er elstur av seks systkjum. Hann er føddur og uppvaksin á Sandi. Foreldrini vóru, Marsanna, f. Johannesen úr Funningi, og Martin Hentze, nevndur Martin hjá Evu-Peturi. Petur fór sín fyrsta túr til skips í 1957 sum 14 ára gamal, sum flestu unglingar tá í tíðini, við sluppini Fagranes. 18 ára gamal sigldi hann við Hamranesi, hann sigldi í nøkur ár, síðan fór hann at læra til maskinsmið hjá Wenzel Petersen í Havn. Eftir lokna sveinaroynd sigldi hann við



Dagsstjørnuni sum maskinmaður, til hann fór á maskinskúla. Í 1967 giftist Petur við Mariu, dóttir Karolinu og Hans Paula Johannesen í Havn. Tey fingu børnini, Maritu, Daniu, Hans Paula og Karolinu. Í 1969 fór Petur við familju niður til Keypmannahavnar, har hann tók maskinmeistaraprógv. Tá mátti man til Danmarkar at taka ta endaliga maskinmeistaraprógvið. Familjan flutti heim aftur til Føroya og keyptu húsini Oman Viðarlund, har tey búgva í dag. Petur fór at sigla við danska reiðarínim Kosan-Tankers sum maskinstjóri. Hann sigldi har í nøkur ár, til hann legðist upp á land fyri 24 árum síðan. Hann hevur verið lærari við Tekniska Skúlan í Havn. Um summari hjálpir hann til á summarlegunum á Zarepta á Vatnsoyrum. Petur eigur fýra abbasynir, teir eru Petur, Jóhann, Eyðun og lítli Heini. Petur var fyri tí stóra missi at konan, Maria, doyði fyri fýra árum síðan. Petur hevur verið sera trúfastur móti familjuni, foreldrunum og okkum systkjunum.

*Stór er tín trúfesti, stór er tín trúfesti;*
*nýggj hvønn ein morgun er náðin frá tær.*
*Alt, ið eg njóti, frá tær er tað komið;*
*stór er tín trúfesti, Harri, mót mær.*

Hjartaliga tillukku

**M.S.**



NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



## Elin og Otto Joensen gullbrúdleyp

Mánadagin 21. apríl, sum er 2. páskadagur, hava Elin og Otto Joensen í Klaksvík verið gift í 50 ár. Tey eru bæði úr Klaksvík, og saman við so mongum øðrum hava tey verið við til at sett dám á býin í mong ár. Nú hava tey lagt formligu ábyrgdirnar frá sær, men innihaldið í gerandisdegnum er framvegis nógv og gott. Tey eru løtt upp á sporið, og tey síggjast ofta ganga túrar. Heimið hevur verið eyðkent av gestablídni og gudsótta, og tey eru mong, sum dagliga detta inn á gólvið, og njóta ein góðan drekkamunn frá Elini. Otto hevur altíð verið íðin í urtagarðinum, og tað tað sást væl í garðinum kring húsini, sum tey lótu byggja á Vágsheygnum, og sum tey hava búð í øll hesi fimmti árini.

Elin og Otto eiga tvær døtrar. Lydia, sum er frisør og litráðgevi, er gift við Meinhardi Petersen, sum er annar av skiparunum á Norrønu. Hann er klaksvíkingur. Tey eiga fýra børn og búgva í Klaksvík. Lena, sum er læraralærd, er gift við Tryggva Neshamar, sum er ættaður úr Fuglafirði og er útlærdur radiomekanikari. Tey eiga trý børn, og tey búgva í Paamiut í Grønlandi, har tey eru virkin í trúboðanarverki. Nú foreldrini halda gullbrúdleyp, eru Lena og familjan heima í Klaksvík.

Elin, sum er fødd í 1929, er dóttur Jógvan Edvard Lydersen, sum var av Viðareiði, og Lenu, fødd Steffensen, úr Árnafirði. Tey giftust í 1925 og fluttu árið eftir úr Árnafirði og til Klaksvíkar, har tey settu búgv á Stongunum. Tey fingu trý børn – Elina og Óla, sum býr í barnaheiminum. Lydia var elst. Hon doyði av sjúku bara nítjan ára gomul.

Elin var heimaarbeiðandi húsmóður, inntil døtrarnar vóru tilkomnar. Um somu tíð fóru tær tríggjar at arbeiða á Sjómansheiminum í Klaksvík, og har var Elin, inntil hon fyri fáum árum síðani legði frá sær.

Otto, sum er føddur í 1928, er sonur Armgarð og Dávur Joensen. Hon var úr Trøllagili, og hann var úr Gerðum, Har yviri, sum gerðafólk nevndu húsini, ið vóru sunnanfyri Gerðagarð. Húsini áttu Elsa Maria, sum var ættað úr Hoygarðinum á Toftum, og Ólavur Joensen ella Óli Klokkari, sum hann varð nevndur. Tey fingu seks børn. Elstur var Jógvan, sum seinni fekk sær eftirnavnið Kjølbro, og næstur var Dávur. Armgarð vaks upp hjá abba og ommu síni, Armgarð og Karl á Vágsheygnum, og tað var har, Armgarð og Dávur búsettust. Hann varð altíð nevndur Dávur úr Gerðum.

Armgarð og Dávur fingu tíggju børn: Kalla, Óli, Emma, Jóannes, Maria, John William, Hans Jákup, Assa, Otto og Levi. Emma lærdi til lækna og var í mong ár lækni í Fuglafirði. Hini búsettust øll í Klaksvík, og allir dreingirnir vórðu skipsmenn uttan Otto. Óli, Jóannes og Maria eru farin foldum frá.

Saman við beiggjanum Jógvani Kjølbro átti Dávur Stórubeding, og har fór Otto at læra jarnsmíð. Hann var blaðungur, tá ið hann gjørdist stjóri, og hann var á bedingini í næstan fjøruti ár. Síðstu árini, áðrenn hann varð pensioneraður, var Otto lærari á tekniska skúlanum í Klaksvík.

At Otto tíðliga tók við ábyrgd sást eisini í politisku leiðini hjá honum. Í 1959 kom hann í sóknarstýrið fyri Fólkaflokkin, og har var hann inntil í 1970, tá ið hann ikki stillaði uppaftur. Otto var formaður í sóknarstýrinum í 1962 og 1963. Tá ið kongur varð í Klaksvík í sambandi við vígsluna av Christianskirkjuni í 1963, varð Otto heiðraður við riddarakrossinum.

Sum nevnt, so gjørdist Otto gjørdist ikki skipsmaður, men harvið er ikki sagt, at hann ikki hevur havt góðan hug og hevur góðan hug til sjógvin. Neyvan nakar man hava flotið so nógv á og út frá Borðoyarvík sum Otto umborð á Kallanesi. Hann hevur verið óførur at skjóta fugl og nísur, hann hevur verið íðin grindamaður, og hann kennir hvønn blink og hvørt mið. Í nógvum av fiskikappingunum, sum hava verið fyriskipaðar í Klaksvík, hevur Otto verið fiskikongur.

Seinast í níti árunum lutaði hann sína vitan og sítt innlit um fiskimið á kendu leiðunum við hini í bókini Søgusmettan.

2. páskadag halda Elin og Otto stóra dagin á sjómansheiminum í Klaksvík.

## Torben Schneider
## 50 ár

Fríggjadagin 18. apríl fyllir Torben Schneider í Hoyvík 50 ár. Torben er dani, hann kemur frá Hørsholm, norðan fyri Keypmannahavn. Hann er útbúgvin landslagsarkitektur og kom til Føroya í seinnu helvt av 80-unum. Saman við øðrum stovnaði hann fyritøkuna Sp/f Hjálpirót, sum hann í dag er stjóri á. Fyritøkan rekur urtagarðsvirksemi, nýgerð og ráðgeving. Torben er giftur við Esther Djurhuus, ið er uppvaksin í Fuglafirði, hon arbeiðir sum pedagogur á barnadeildini á Lands-sjúkrahúsinum. Ester eigur dóttrina Duritu, saman eiga Esther og Torben sonin Niclas.





## Kim Røsvik - ungdómsraðgeving í Havn

Kim Røsvik í Havn hevur ráðgeving til tey ungu millum 10 og 16 ár. Kim, ið er 24 ára gamal, er føddur og uppvaksin í Havn. Hann hevur búð nøkur ár í Danmark, har hann m.a. ansaði børnum á einum barnagarði og var hjálparlærari í einum forskúla í Randers. Fyri einum ári síðan byrjaði hann sína egnu ungdómsráðgeving í Havn. Hansara arbeiðsdagur er: hósdag-sunnudag frá kl. 23.00 um kvøldið til kl. 6.00 á morgni, og mánadag- hósdag frá kl. 11.00 til 15-16.00 seinnapart. Hansara málbólkur eru tey ungu millum 10 og 16 ár. Hann tosar við tey ungu og tey kunnu venda sær til hansara við ymiskum spurningum. Kim kundi hugsað sær at eitt pláss var í býnum til tey ungu, serliga um kvøldarnar og um næturnar. Hann hevur gjørt eina kanning millum tey ungu, um hvat tey ynskja sær o.l. Eitt av ynskjunum er t.d at fingið eina skateboardrampu. Eisini at tey kundu íðka ítrótt, uttan at tað endiliga skal vera ein kapping um at vera best. Soleiðis at øll kunnu vera við. Kim vónar at okkurt kemur at spyrjast burturúr, og at myngugleikarnir koma at stuðla honum. Hann hevur telefon nr. 506411 / 313490, teldupostadressur: ungdoms.r@kallnet.fo / kim.rosvik@kallnet.fo

## Gullbrúdleyp

2. páskadag 21. apríl hava hjúnini Signhild og Martin Tórgarð gullbrúdleyp. Tey, ið vilja heilsa uppá gullbrúðarparið, kunnu støkka inn á gólvið í Guttormsgøtu 25 í Hoyvík hátíðardagin millum kl. 12 og 15.

## Dagurin

17. apríl. Anicetus, deyður umleið 166. Hann var Pávi. Í Føroyum hevur mansnavnið Setus verið brúkt.

18. apríl. Eleuterius, biskupur í Illýriu, tikin av døgum umleið ár 200. Dagurin verður eisini skrivaður Elenterius.

19. Dánjal. Ein av teimum fýra stóru profetunum í Gamla testamenti. Bíbilska navnið merkir: Gud er dómari.

20. apríl. Sulpicius, deyður umleið 1115. Háborin rómverji, sum saman við einum øðrum, Serilianusi, gjørdist kristin; teir vórðu hálshøgdir.

21. apríl. Floerentius. Fleiri halgimenni eru við hesum navni. Hesin dagurin er ásettur til minnis um teir allar.

22. apríl. Cajus, deyður í 296. Hann var Pávi. Fríðrikur Petersen varð føddur hendan dagin í 1853.